# Føroyingar við á oljumessu í Noregi

Um okkara leiðir verða tvær stórar oljumessur hildnar. Annaðhvørt ár verður Offshore Europe framsýningin hildin í Aberdeen, og annaðhvørt ár verður ONS ella Offshore Northern Seas hildin í Stavanger.

Føroyskar fyritøkur, oljufyrisitingin og almennir myndugleikar hava við góðum úrslitum luttikið á teimum báðum seinastu framsýningunum í Aberdeen, men higartil hava vit ikki ført okkum fram á ONS í Stavanger.

Vaksandi áhugin fyri Føroyum sum komandi olju- ella gassútvinningarøki, og vaksandi áhugin millum føroyskar fyritøkur at koma uppí frálandavinnu longu nú ger, at Menningarstovan, Oljufyrisitingin og Føroya Arbeiðsgevarafelag saman hava teknað seg fyri bási á ONS 98, sum verður hildin í Stavanger í døgunum **25.-28. august 1998.**

Nógvar føroyskar fyritøkur hava tikið upp samband við útlendskar fyritøkur innan frálanda vinnu, og í vár vóru føroyskar fyritøkur, einstaklingar og feløg í Stavanger fyri at kanna, hvussu vinnulív og samfelagið har hava ment seg í sambandi við norsku oljuvinnuna. Ferðin varð eisini gjørd sum eitt stig móti størri samstarvi millum teir, sum longu eru í oljuvinnuni, og føroyskar fyritøkur, sum ætla sær eina framtíð innan hesa krevjandi vinnu.

ONS framsýningin er á mangan hátt størri og meira stórtøkin enn Offshore Europe í Aberdeen, men í aðra máta líkjast tær - eitt tiltak, har fyritøkur, stovnar og feløg við áhuga og ábyrgd av frálandavinnu hittast og tala saman um verandi og framtíðar samstarv, síggja nýggja tøkni og skipanir og hava umstøður at gera seg kendan við nýggjar fyritøkur og fyritøkusambond

Í sambandi við framsýningina verður eisini ráðstevna við rættuliga áhugaverdum innihaldi og framsøgufólki, sbr. hjáløgdu skrá.

Fleiri føroyskar fyritøkur hava longu boðað frá, at tær ætla at luttaka á føroyska básinum á ONS og væntandi fara eisini fleiri almennir stovnar og onnur at luttaka. Menningarstovan, ið stendur fyri praktisku samskipanini av føroyska tiltakinum undir heitinum North Atlantic Resource Centre hevur vent sær til tær fyritøkur, feløg og stovnar, sum hava gjørt vart við sín áhuga í oljuvinnu. Fyritøkur og onnur, sum ikki hava fingið skriv í hesum sambandi, og sum halda, at ONS 98 kann vera eitt kærkomið høvi at bjóða seg fram, eru vælkomin at venda sær til Menningarstovuna. Hetta má tó gerast sum skjótast, annaðhvørt á tlf. 313028 ella á fax 310459

Í sambandi við framsýningina verður almen føroyska upplýsingartilfarið, Faroe Islands Business Environment, dagført og endurgjørt at leggja fram. Umframt upplýsingar, sum væntað er, at ein enskttalandi lesari við serligum áhuga innan kolvetnisvinnu kann hava, hevur upplýsingartilfarið navn og adressu hjá stovnum, feløgum, fyritøkum o.ø., har tann áhugaði kann venda sær at fáa meira at vita ella fáa tænastu. Fyritøkur og stovnar, sum halda seg hava nakað at bjóða útlendingum við áhuga innan oljuvinnu, og sum ikki longu eru við í upplýsingartilfarinum, eru somuleiðis vælkomin at venda sær til Menningarstovuna.







Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna*.
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin
***ókeypis!***

Navn:
Bust.:
Postnr., bygd/býur:
Tlf.:
Undirskr.:

☐ Haldarar í Føroyum: 240,-/ársfj.
☐ Haldarar í Danmark: 425,-/ársfj.
☐ Haldarar í Danmark, 5 bløð í senn: 340,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir